# Vikuskifti

Nr. 207 • Vikuskiftið 29.–30. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Føroyar 2015 skal verða tjóðskaparlig semja!

TING-HELLAN

Tinghellan s. 34–35

# Kheops verður jazzdepil og veteranarnir byrja

Leivur, Arnold og Rógvi. Fá ivast í hvørjir teir eru og eftirnøvn eru óneyðug. Í felag hava teir í hvussu er Plúmm. Café Kheops verður nýggjur jazzmiðdepil í Havn og teir, ið leggja fyri fríggjadagin 4. november, eru júst nevndu úrmælingarnir, ið eisini hava ætlanir um fløgu. Teir spæla annaðhvørt vikuskifti á Kheops, men ímillum eru nýggj og evnarík nøvn at hoyra



*Leivur Thomsen, Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu, allir við rót í Plúmm, hava stovnað nýggja jazztrio, sum verður at hoyra á Café Kheops annaðhvørt vikuskifti.*

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Plúmm uttan síðsta M'ið. Magnus er ikki við í júst hesi samansetingini, men ein nýggj trio hevur sæð dagsins ljós. Leivur Thomsen, Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu, allir við rót í Plúmm, hava stovnað nýggja jazztrio, sum verður at hoyra á Café Kheops annaðhvørt vikuskifti.

Keopps verður jazzmiðdepil í Havn. Veteranarnir í hesi nýggju trio seta hol á fríggjakvøldið 4. november og spæla ætlandi annaðhvørt vikuskifti.

At hesir duga sítt kramm er óneyðugt at fara at brúka blaðrúmd til her, men við sær í nýggju samansetingina hava teir hvør í sínum lag nýggj og spennandi tónleikaverk.

Men vikuskiftini ímillum verða heldur ikki keðilig. Yngri og evnarík nøvn eru á lepanum. Fríggjadagin eftir, 11. november, er ungur og evnaríkur maður á skránni. Ein ungur harri, ið er á veg fram. 17 ára gamli Benjamin Petersen fer á pallin og við sær hevur hann tveir aðrar blásarar, nevniliga Trónd Olsen og Báva Juul Magnussen.

## Øll sløg

Rópini um spælistað, ella støð, hava longi ljómað í Havn. Nú er so ein pallur komin til jazzin.

Keopps verður ætlandi nýggjur jazzdepil í Havn og talan verður um allan jazz, alt frá standard til latin og tað, sum er harímillum. Eisini guitarúrmælingurin á spanskan guitar, Ragnar, ið er tónleikalærari, verður at hoyra regluliga á Kheops.

Eitt stað við livandi tónleiki, har blaðað verður upp á jazz í gomlum sum nýggjum nótaørkum og har talan er um allan jazz, kanska eisini tað slagið av jazzi, ið ikki er fest á blað, tí hann er enn er ov livandi.

Ein livandi pallur, har nýggj og eldri, roynd nøvn skiftast at føra fram.

## Fløga

Um eitt hálvt ár, ella so, fara Rógvi, Arnold og Leivur í upptøkuhølini at taka upp fyrstu fløguna, ið henda nýggja jazztrio spælir inn.

Tá fløgan er komin á marknaðin einaferð í vár, er ætlanin at fara á ymsar festivalar í útlondum at spæla.

Jú, hóast síðsti Plúmmarin, Leivur, júst er komin aftur á klettarnar, eftir at teir allir hava verið burtur í útlegd longri og styttri, so tykist, sum kennist "J" bókstavurin í orðinum Jazz ikki sum eitt akker, ið bindur teir niður. Heldur er hetta tað, ið heldur teir á felags grund, men sum hevur nóg langa ketu, so tað hevur loyvt teimum at royna seg í longri áramál á øðrum beitum, men altíð finna teir heimaftur og saman.

Í vár, tá fløgan er komin, fara teir ætlandi í felag at vitja útlendskar festivalar og at hoyra, hvat teir hava at bjóða. Og ikki minst vísa, hvat føroyskur jazzur hevur til kræsin oyru.

Føroyskir lurtarar hava tó møguleikan í vetur at hoyra nýgju jazzsamansetingina og fyrstuferð verður á Keopps 4. november.